— Hatta vóru ikki míni orð

sigur Dánjal av Rana, nevndarformaður í Tvøroyrar flakavirki um samrøðu, sum Óli Breckmann hevði við seg í Dagblaðnum seinasta mánadag.

Ein stórur partur av samrøðuni, sum Óli Breckmann, blaðstjóri á Dagblaðnum, hevði við Dánjal av Rana, nevndarformann í Tvøroyrar flakavirki í Dagblaðnum seinasta mánadagin, var rein manupulatión — blaðstjórin hevði rætt og slætt lagt nevndarformanninum orð í munnin.

Hetta fingu vit burtur úr, tá vit tosaðu við Dánjal av Rana hósdagin og bóðu hann um eina viðmerking til umrøddu samrøðu hann hevði við Dagblaðið.

— Hatta vóru als ikki míni orð.

Sigur Dánjal av Rana.

Hann vísir annars til, at tá nevndarfundurin á flakavirkinum var liðugur seinasta friggjadag, ringdu fleiri fjølmiðlar til sín og millum teir var so eisini Óli Breckmann fyri Dagblaðið.

— Eg helt einki løgið vera at tosa við Óla Breckmann, tí uttan mun til, hvørjir mínir politisku mótstøðu menn eru, so havi eg virðing fyri teimum. Teir, eins væl og eg sjálvur, hava loyvi at hava sína meining. Men her hevur ÓB so lagt mær orð í munnin, eg ikki havi sagt.

— Í samrøðuni við Óla Breckmann verður tú m.a. siteraður fyri at siga: »Í morgin kendi eg tað á mær, sum mótstøðan móti okkum er nógv viknað. Tað hevur eydnast at fáa fólk at skilja, hvat ætlanin hjá hini klikuni var við útmeldingini. Teir ætlaðu sjálvir at sita við vinningi og avlopi av søluni, meðan virkið gekk illa« sitat endað. Hetta eru hørð orð. Eru tey tini?

— Hatta havi eg ongantíð sagt og kundi ongantíð hugsað mær at sagt slíkt. Eg veit ikki um Óli Breckmann hevur tikið samrøðuna við meg upp á band, men tað kann eg standa inni fyri, at slíkar vendingar eru ikki mínar.

— Men tú hevur so ikki avsannað tað í bløðunum enn. Hví?

— Eg sá ikki Dagblaðið fyrr enn mánadagin og eg havi so hugsað um hetta. Tað fyrsta eg hugsaði var, at hatta er bara Óli og soleiðis siga so mong onnur jú eisini.

Og Dánjal heldur fram: — Nú tit so biðja um eina viðmerking til hatta málið, so kann eg bert siga, at nógv av hasum orðunum eru als ikki míni.

Men eg haldi nú heldur ikki, at nøkur orsøk var hjá Sosialinum at brúka orðið lygn í yvirskriftini um meg.



DAGBLAÐIÐ 29. JUNI 1987 — SÍÐA 5

Dánjal av Rana, nevndarformaður í Tvøroyrar Flakavirki:

— Mín størsti sigur higartil

— Í fleiri ár havi eg stríðst ímóti tí maktsjúku, sum nú ræður í landsstýrinum, men nevndarfundurin í morgun kendi eg sum mín størsta persónliga sigur higartil.

— Føroya landsstýri hevur størstu skuld í humbukkinum, sum verið hevur í flakavirkinum.

— Grannskoðarar prógva nú, at Tvøroyrar flakavirki hevði vánaligast úrslit fyrstu 5 mánaðirnar í ár av 8 flakavirkjum.

Hetta sigur ein hart royndur Dánjal av Rana við Dagblaðið.

— Nú havi eg stríðst í nógv ar mótbarkaðstøðum, sum valdar í landsstýrinum og hevur valdað á Tvøroyri. Margan hevur ein verið í dapurhuga og kent seg einsamallan í stríðinum móti ovurmaktini.

— Men nevndarfundurin í morgun hjá Tvøroyrar flakavirki má kalla mín størsti sigur higartil. Tá atkvøddu 5 av 7 limum fyri, at flakavirkið framhaldandi skal vera limur í Føroya Fiskasølu.

Hetta sigur ein maður, men tolliga væl ongur Dánjal av Rana, nevndarformaður í virkinum, formaður í arbeiðsmannafelagnum Fylking og borgarstjóri á Tvøroyri, í samrøðu við Dagblaðið frágreiðandi.

LOKABRØGD ÚR TINGANESI

— Uppruni til alt rumbið á flakavirkinum við út- ella innmelding í Fiskasøluna er, at fimm í landsstýrinum, sigur Dánjal.

— Føroya landsstýri hevur stórvu leikluti í tí vanaligu vøtelnki, sum ein óvanliga og ikki fullmannað virksinsnevnd útsett virkið fyri alment, tá stjórin legði til brots og kunngjørdi útmeldingina í bløðunum, samtundis sum hann greiddi frá, hvussu vøl virkinum hevði gingist uttan fyri Fiskasøluna. Hetta er nevniliga ikki rætt — men um tað seinni, sigur Dánjal.

— Umboðsmaðurin hjá landsstýrinum í nevndini, Karl Jespersen, átti at verið lovaður móti metingartanum og ikki verið tungan á vágskálini, tá ein so alvarslig avgerð skal takast av einum annars ikki rætt samansettum nevnd.

— Men eisini tey lokabrøgdini ikki Karl boð um tað landsstýrinum, heldur Dánjal fast við.

HEILIR 5 MÓT BARA 2

Úrslitið á nevndarvatkvøðugreiðslum friggadagin var annars heilar 5 atkvøður fyri framhaldandi limaskapi móti bara 2 fyri útmelding. Her er koppað á síðan fyrra fundin, sum endaði við útmelding. Tann fundurin var bert áðrenn aðalfundin, sum valdi Gunnar Vestergaard í nevndina fyri Sigrar Dam og Kristin Michelsen fyri Hermund Mikkelsen.

— Gunnar Vestergaard, Asla Jespersen, Olavur Simonsen, Kristin Michelsen og eg sjálvur atkvøddu í dag fyri framhaldandi limaskapi í Fiskasølu, sigur Dánjal.

— Dánjal Jákup Jensen, sum umboðar 30.000 kr. í partapeningi hjá Livsforsikringsfelagnum, og Karl Jespersen, sum er umboðsmaður hjá landsstýrinum, hildu fast um sína støðu fyri útmelding, og hana hevði teir eisini settast.

— Men fyrra fundin at kvøddu umframt teir báðar eisini Sigrar Dam, sum bara umboðaði 10% av privata partapeningínum og ikki longur er nevndarlimur, og Joanes Eidesgaard, sumarsakað av sjúkrafrálovsinum hjá Hermundi Mikkelsen sat sum viðtakismaður í nevndini fyri útmeldingini, greiðir Dánjal frá.

RINGAST AV Á VIRKJUM

— Í morgun kendi eg tað á mær, sum mótstøðan móti okkum er nógv viknað. Tað hevur eydnast at fáa fólk at skilja, hvat ætlanin hjá hini klikuni var við útmeldingini. Teir ætlaðu sjálvir at sita við vinningi og avlopi av søluni, meðan virkið gekk illa.

— Nevndarlimirnir luttóku, eisini við atluga eftir skiftisavtalunum, tá tit havdu fund við Fiskasølurn frammanundan.

— Tað metti avtalurnar og tekkandi var so, at grannskoðarin hjá Tvøroyrar Flakavirki hevur júst prógvað fyri nyggjar nevndini, at rakstrarurslitið hjá virkinum er nógv betri, enn Heri Mortensen hevur reyp að av í Sosialinum.

— Grannskoðarin prógvaði, at fyrstu fimm mánaðirnar av 1987 liggur Tvøroyrar Flakavirki á botni millum 8 flakavirki í landinum. Skiftisavlopið hjá okkum er bara 1,72 kr. kilo, meðan meðal fyri hini nevndu virki er 2,04 kr.

— Hetta er so tekin um, at solo-spæl hjá hinum partinum er ikki til gagns fyri heildina fyri virkið, sigur Dánjal av Rana, formaður í nevndini hjá Tvøroyrar Flakavirki, at enda sína viðmerking til Dagblaðið.

G.B.

Uttan um inaflutningsgjaldið?

Greinin í Dagblaðnum síðsta mánadag

— Nú leggur tú stóran dent á at leggja eftir landsstýrinum í samrøðuni við ÓB. Hevur ÓB eisini her lagt tær orð í munnin?

— Soleiðis sum hann orðar tað havi eg ongantíð sagt. Men tað kann eg standa inni fyri, at slíkar vendingar eru ikki mínar.

Vendingar sum maktmálborið meg. Eg havi bert sagt, at landsstýrisumboðið átti stóran leiklut í tí, sum fór fram og at tað atkvøddi ímóti meirlutanum av partapeningínum.

Vendingar sum maktsjúku frá landsstýrisins síðu havi eg heldur ikki brúkt. Hatta eru orð Óla Breckmanns.

jan

Dánjal av Rana um limaskapin í Fiskasøluni:

Okkara avgerð var røtt

Seinasta friggjadag samtykti nevndin í Tvøroyrar flakavirki at virkið skal blíva verandi limur í Føroya Fiskasølu. Undanfarna nevndin hevði annars nakað frammanundan samtykt at taka virkið úr Fiskasøluni. Hesa avgerð var ein meiriluti av partaeigarunum ónøgdur við og á fylgjandi aðalfundinum varð nýggj nevnd vald, sum síðani setti ynski fram um at hava fund við Fiskasøluna fyri at fáa meira greiðu á støðuna.

— Á hesum fundi var ymiskt tilfar lagt fram og segði tað okkum so mikið sum, at tað var rætt at blíva verandi í Fiskasøluni.

Vit fingu m.a. at vita á tí fundinum, at av 9 virkjum hevði Tvøroyrar flakavirki tað næst ringasta skiftisavlopið — Tað var fyri 5 mánaðar í ár. Vit fingu eisini at vita, at Fisk í Hvalba hevði 60% av kongafiski og blálongu, meðan Tvøroyrar flakavirki hevði 50% og varð eisini sagt frá, at kongafiskurin og blálonga er góð rávøra at fáa. Tað verður so eisini sagt, at barometrið fyri at vísa, hvussu støðan er á einum virki, er skiftisavlopið og okkara var heilt niðri á 1.72 fyrstu fimm mánaðirnar í ár.

Dánjal av Rana sigur, at alt árið 1986 og tað, sum farið er av 87 hevur ikki verið ein króna til avlops á Tvøroyrar flakavirki.

Vit spurdu hann, um tað ikki kann virka eitt sindur bakvent, tá vit fyrst hoyra ein høgtmettan grannskoðara siga, at leiðslan á Tvøroyrar flakavirki er millum landsins bestu og nevndin so tekur og ger beint øvugt av tí, sum henda sama leiðslan mælir til?

— Tað kann tykjast so. Carl Vilhelm Weihe hevur sagt hatta oftani, og hann er eisini provokeraður til at siga tað. Meira sigi eg ikki um tað her.

Annars vísir Dánjal av Rana á, at fíggjarliga støðan hjá flakavirkinum er ikki so góð, sum mong vilja gera hana til.

Meðan virkið við ársbyrjan í 1986 hevði skuld í føstum lánum uppá 20 mill. kr., so hevði tað skuld uppá 33 mill. við ársenda, sum m.a. skyldast umlegging av einum himmalhøgum kassakreditti.

— Sølupolitikkurin er so tann, at vit á nýggjárinum høvdu á goymslu fyri 6 mill. kr. og høvdu selt til Marr & Co. fyri aðrar 6, sum vit ikki høvdu fingið pengar fyri.

— Sum limur í Føroya Fiskasølu fáa vit tá pengarnar goldnar forút, so hetta sigur mær einki um nakran dyggan sølupolitikk frá okkara síðu.

Dánjal av Rana vísir eisini á, at útreiðslur í samband við egið søluarbeiði eru øktar ómetaliga nógv.

— So samanumtikið haldi eg vit hava tikið eina rætta avgerð við at blíva verandi í Føroya Fiskasølu, sigur Dánjal av Rana at enda.

jan

Lýsið í **sosialinum**

Skjótt dekkskifti

Vit skifta dekk og avbalansera.
Oljuskift og annað verður eisini gjørt.

Skjót og góð avgreiðsla.!

LAMBA DEKKSØLA